Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Súsanna Bertholdsen, løgtingskvinna

Svarari: Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum

Evni: Lógaruppskot um málskúla fyri føroyskt sum annaðmál

Spurningar:

1. Nær verður lógaruppskotið um málskúla fyri føroyskt sum annaðmál lagt fram í Løgtinginum?

Viðmerkingar:
Ein týdningarmikil liður í integratiónspolitikki landsstýrisins er sambært heimasíðu Barna- og útbúgvingarmálaráðsins at skipa fyri, at borgarar, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrstamál, fáa møguleika fyri at ogna sær hollar førleikar at samskifta á føroyskum, møguleika fyri at ogna sær holla vitan um samfelag og mentan í Føroyum, eins og møguleika at útbúgva seg innan føroysku útbúgvingarskipanina. Mett verður, at hetta er umráðandi fyri at tryggja góða integratión.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur gjørt eitt lógaruppskot um Málskúla fyri føroyskt sum annaðmál, sum fór til almenna hoyring í 2023. Hoyringarfreistin var 31. oktobur 2023.

Tað eru mong, sum ótolnast eftir at vita, hvussu gongur við lógaruppskotinum, so vit fáa skipaði og eins undirvísingarviðurskifti kring alt landið á hesum øki, og tí verður hesin spurningur settur.

Á løgtingi, 26. januar 2024

Súsanna Bertholdsen